Formaðurin í Búskaparráðnum um tilmælini:

# Fíggjarligi parturin átti at verið við

**– Eg haldi, at ein partur av ráðgevingini um fiskidagar átti at bygt á tann fíggjarliga partin í hesum, men her standa vit púrasta á berum, tí vit eru ikki við í ráðgevingini, sigur Hermann Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum**

TILMÆLINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tilmælini um fiskidagar, sum latin eru landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, eru rættiliga misjøvn á máli um, hvussu nógvir fiskidagarnir skulu verða komandi fiskiár, sum byrjar 1. september.



*– Eitt er fiskifrøðiliga ráðgevingin, sum fiskifrøðingarnir taka sær av. Eitt annað er tann búskaparligi parturin í hesum og avleiðingarnar av teimum avgerðum, sum tiknar verða. Her áttu vit at verið við, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson*

Vit hava spurt formannin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, um hann sum formaður hevur nakra meining um hesi viðurskifti.

### Á berum

– Eg má siga, at her eri eg á einum lendi, sum eg ikki kenni nóg væl, og tí havi eg sum formaður í Búskaparráðnum heldur ikki gjørt mær nakra ávísa meining um tey tilmæli, sum komin eru.

Hermann heldur, at ráðgevingin avgjørt eisini átti at fevnt um fíggjarliga partin, tí hesin sjálvsagt hevur týdning í samanhanginum.

Hann vísir á, at Kjartan Hoydal, sum hevur verið formaður í Fiskidaganevndini, áður hevur ført fram, at búskaparligi parturin átti at verið umboðaður í ráðgevingini.

– Men her eru vit ikki við, og tí noyðast vit at melda pass, og tað haldi eg vera harmiligt, sigur Hermann Oskarsson.

### Torfør tilmæli

Hann sigur, at serliga í tíðum, har fiskifrøðiligu umstøðurnar broytast, er torført hjá fiskifrøðingum at gera síni tilmæli, og tað er ikki minst í slíkum tíðum, at vit áttu at verið við.

– Eitt er fiskifrøðiliga ráðgevingin, sum fiskifrøðingarnir taka sær av. Eitt annað er tann búskaparligi parturin í hesum og avleiðingarnar av teimum avgerðum, sum tiknar verða, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson.



# Misjøvn tilmæli um fiskidagar

**Eins og undanfarin ár, er etableraða fiskifrøðin og vinnan ikki samd um talið av fiskidøgum**

TILMÆLINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, hevur fingið tilmælini um fiskidagar fyri komandi fiskiár, er greitt, at hesi eins og undanfarin ár liggja langt frá hvørjum øðrum.

ICES og Fiskirannsóknarstovan mæla til stórar skerjingar í fiskidøgunum eftir ávikavist toski, hýsu og upsa, og sambært tilmælunum hjá Fiskirannsóknarstovuni skulu hesar skerjingar serliga ganga útyvir húkaflotan, sum er útróðrarflotin og línuflotin.

Fiskidaganevndin mælir hinvegin til óbroyttar fiskidagar burtursæð frá fiskidøgunum eftir toski á Føroya Banka, sum hon mælir til verða skerdir við 10%.

Vinnulívið í Føroyum, sum hevur havt íslendska fiskifrøðingin, Jón Kristjánsson til hjálpar, heldur, at vit skulu venda aftur til grundarlagið, sum lá til grunds fyri fiskidagaskipanini og møguliga hækka talið av fiskidøgum.

# Dýrt at fylgja ráðunum

**– Høvdu politikarar havt fylgt ráðunum hjá fiskifrøðingum seinastu mongu árini, hevði hetta havt kostað samfelagnum ógvuliga dýrt, bæði á sjógvi og landi, sigur Alfred Olsen, løgtingsmaður og limur í vinnunevnd løgtingsins**

RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Alfred Olsen, løgtingsmaður, sigur, at hóast tilmælini hjá fiskifrøðingum ikki hava verið fylgd, er ikki líkt til, at hetta hevur gingið álvarsliga útyvir okkara fiskastovnar.

– ICES og Fiskirannsóknarstovan hava í fleri ár mælt til niðurskurðir í fiskidøgum uppá í miðal eini 25% á hvørjum ári, tá ið ræður um høvuðsfiskasløgini. Men hóast hesi tilmæli ikki eru fylgd, noyðast fiskifrøðingar kortini at ásanna, at fiskastovnarnir sum heild eru væl fyri.

Løgtingsmaðurin, sum eisini er limur í vinnunevnd løgtingsins, vísir til Kjartan Hoydal, fiskifrøðing, sum hevur sagt, at grundarlagið undir tilráðingunum hjá ICES og Fiskirannsóknarstovuni er ein kvotaskipan og ikki fiskidagaskipanin, sum vit hava í dag.



*Alfred Olsen, løgtingsmaður, heldur, at tilmælini hjá fiskidaganevndini hava víst seg at hildið betur enn tilmælini hjá ICES og Fiskirannsóknarstovuni*

– Líkt er til, at fiskifrøðingar "gloyma", at vit hava eina – um vit so kunnu siga – sjálvregulerandi fiskidagaskipan og ikki eina kvotaskipan, sum vit áður høvdu.

Løgtingsmaðurin vísir á, at tilmælini hjá fiskidaganevndini hava víst seg at hildið betur enn tilmælini hjá ICES og Fiskirannsóknarstovuni.

Hann harmast um, at lagt verður so harðliga eftir húkaflotanum í nýggjasta tilmælinum hjá fiskifrøðini, tí hann heldur ikki, at grundarlag er fyri øllum tí, sum ført verður fram mótvegis útróðrar-og línuflotanum.

– Tað, sum vit her síggja, er ein annar hugburður enn tann, vit plagdu at halda um húkaveiði, og eg ivist stórliga í, um fiskifrøðin her er á rættari leið, sigur Alfred.

Løgtingsmaðurin heldur, at høvdu tilmælini hjá fiskifrøðingum upp ígjøgnum árini verið fylgd slaviskt, hevði samfelagið havt mist ógvuliga stór virðir.

– Hetta hevði so sanniliga sæst aftur, bæði á sjógvi og landi, sigur Alfred Olsen, løgtingsmaður.



